## Minni íløgur í varandi orku

Nýggj tøl hjá ST vísa, at hugurin at gera íløgur í varandi orku hevur verið minni higartil í ár, enn hann var í fjør. Sagt verður, at annan ársfjórðing í ár vóru íløgurnar heili 40 prosent minni enn fjórða ársfjórðing í 2007. Anders Stouge í danska ídnaðarfelagnum sigur við kringvarpið DR, at tað eru serliga íløgurnar í biobrennievni, sum eru minkaðar nógv. Tað eru USA og Evropa, sum eru varin við íløgum, men Anders Stouge væntar kortini, at óløguhugurin fer at batna aftur.

## Nógv fáa fyritíðarpensjón

Sætti hvør dani, sum fyllir 60, kann vænta sær fyritíðarpensjón, áðrenn hann ella hon røkkur tí vanliga pensjónsaldrinum, skrivar Ekstrablaðið og vísir til tøl frá danska arbeiðsmarknaðarstýrinum. Av teimum 60 til 64 ára gomlu í Danmark fáa 62.000 fyritíðarpensjón, og tað svarar til 17 prosent ella ein sættapart av teimum, sum eru í hesum aldursbólkinum. Arbeiðsmarknaðarstýið sigur gongdina vera óhepna og mælir til átøk, sum skulu gera, at fólk við skerdum arbeiðsevnum verða verandi á arbeiðsmarknaðinum.

# Ruskpláss og kapell

**Seinastu nógvu árini hevur ein ruskbingja staðið uttanfyri Lanssjúkrahúskapellið. Í bingjuni er alt vanligt rusk hjá sjúkrahúsinum, og tey avvarðandi hava eitt stórt ynski um at sleppa av við hesa støðu**

RUSK
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Seinastu tíðina hevur Sosialurin havt fastan tátt í blaðnum við navninum »Heimsins reinasta oyggjaland«, í hesum tátti er nógv komið fram um rusk, ið sæst av alfaravegi. Men tað er ikki einasta ruskið í landinum.

Í túninum á Lanssjúkrahúskapellinum stendur ein stór bingja, tað leka spillivatn og matrestir úr henni, og støðan hevur verið soleiðis í nógv ár

- Tað er ein spurningur um raðfestingar, og tá talan er um at bjarga fólkið, verður tað sjálvandi vigað hægri enn ein bingja av húsarhaldsruskið, sigur Jan á Argjaboga, tænastuleiðari á Landssjúkrahúsinum.

### Ætla at betra um støðuna

Í fjør var roynt at umvæla bingjuna, ið longu er á økinum fyri umleið 20.000 krónur, men tað var stokkut gleði, tí stutt eftir fór aftur at leka.

- Vit royndu at umvæla í fjør, men tað var ikki gott nokk. Nú er ætlanin at fáa eina nýggja- og betri bingju, sum kostar okkum 155.000 krónur. Men ætlanin er í framtíðini at fáa eitt ordiligt ruskpláss á økinum kring Landssjúkrahúsið, sum sambært kostnaðarmetingini kostar 1,3 mió. Hetta er ikki nakað vit vænta okkum beinanvegin, tí peningur er nóg illa tøkur til at hjálpa sjúklingunum, sum altíð eru í hásætið í húsinum.

### Vænta fígging

Í nógv ár hava fólk á Landssjúkrahúsinum sagt, at sjúkrahúsið væntar fígging, og í hesum málið er trupulleikin tann sami.

- Vit kenna væl til trupulleikan, men hava bara torført við at gera nakað við hann. Har luktar illa og sær als ikki pent út hjá teimum, ið hava ørindir á Kapellinum, men raðfestingarnar á sjúkrahúsinum, sum vendir hvørjari krónu, røkka ikki heilt til at fáa hetta í rætt lag, greiðir Jan á Argjaboga frá.



*Tá fólk fara at geva blóð ella skulu á kapellið, møta tey einari stórari ruskbingja við leka*

# 70 ára gamal smuglari

**Í gjár kom Norrøna inn á Seyðisfjørð. Umborð var ein 70 ára gamal týskari, sum í bilinum hevði umleið 20 kilo av rúsevnum**

SMUGLING
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Rúsevnini vóru funnin í Føroyum, men tollvaldi valdi ikki at gera meira við málið enn at varskógva íslendska tollvaldið.

Tá Norrøna kom til Íslands í gjár, legði íslendska tollvaldið hald á 20 kilo av rúsevnum. Talan var fyrst og fremst um Hasj, men onnur evni vóru eisini við í bilinum, sum hundurin hjá føroyska tollvaldinum valdi sær, tá Norrøna var í Føroyum í fyrradagin.

- Vanliga fáa vit teir bilarnar í land sum skulu, og síðani koyra vit hundin umborð at kanna teir sum eru eftir, siga teir frá tollvaldinum.

Orsøkin til, at 70 ára gamli týskarin ikki var handtikin í Føroyum, er at bilurin stóð á dekkinum, har ongin atgongd er fyri ferðandi, so føroysku tollararnir vóru vísir í, at maðurin onga møguleika hevði at flyta ella burturbeina rúsevnini, áðrenn hann kom til Íslands.

Maðurin situr nú varðhaldsfongslaður í Íslandi, har hann í fyrsta lagi skal sita til 16. septembur.

Vanliga eru tað ikki fólk á so høgum aldri, sum tollvaldið í Føroyum handtekur, men tað kemur meira enn so fyri at fólk eru komin nakað upp í árini.

Frá tollvaldinum siga teir eisini, at teir hava tikið fleiri fólk í ár, enn seinastu sumrini, so rúsevnir eru helst ein vaksandi trupulleiki.



*Tað er ikki tað mest vanliga at smuglarar eru so langt upp í árunum, men tað kemur meira enn so fyri*